# S&K felagið positivt fyri eftirlønarútspæli

**S & K felagið hevur havt fund um útspælið frá Bárði Nielsen, fíggjarmálaráðharra, um framtíðar eftirlønarviðurskifti í Føroyum**

EFTIRLØN
*Tíðindaskriv*



S & K felagið sær jaligt upp á útspælið frá fíggjarmálaráðnum og sær tað, sum eitt upplegg til tjak millum arbeiðsmarknaðin og Landsstýrið.

Landsstýrið ætlar at geva arbeiðsmarknaðinum eini 10 ár at koma upp á eina eftirlønaruppsparing á umleið 15% av inntøkuni, og tað meta vit verða eitt rímiligt tíðarskeið fyri at náa málssetninginum á 15%.

Tað er rættuliga ymiskt hvat fyri prosentgjald, tey ymisku fakfeløgini eru komin uppá. Nøkur fakfeløg hava verið tíðiliga úti og hava lagt dent á at fáa prosentgjaldið til eftirlønina upp, og onnur hava lagt størri dent á at fáa lønini hægri og lagt minni dent á eftirlønina. Tí verða tey fakfeløgini, sum hava lagt størri dent á at fáa lønini hægri, noydd til tey næstu árini at raðfesta eftirlønargjaldið hægri og tey fakfeløgini, sum longu hava eitt høgt prosentgjald til eftirlønina, kunnu seta meira av til hægri løn.

Tað hevur jú verið upp til fakfeløgini sjálvi, hvussu tey hava brúkt lønarkarmin.

S & K felagið er komin umleið á hálva leið fyri at røka málinum við eftirlønarinngjaldinum, og skulu hava umleið 8-9 prosent afturat á eftirlønini tey næstu 10 árini. Tað meta vit ikki skuldi verið nakar trupulleiki.

Fakfeløgini hava nú fingið ein gyltan møguleika, at geva síni sjónarmið til kennar og eiga at standa saman fyri at koma ásamt um eina so góða eftirlønarskipan fyri allar borgarar í Føroyum, saman við Føroya Landsstýrið, sigur S & K Felagið í tíðindaskrivi.

## Ættleiðingarfelagið skipar fyri familjudegi í Leirvík

ÆTTLEIÐING
*Tíðindaskriv*

Árligi familjudagurin og aðalfundurin hjá Ættleiðingarfelagnum verður í missiónshúsinum í Leirvík leygardagin 28. apríl. Dagurin byrjar kl. 10 við morgundrekka og heldur fram til umleið kl. 17.

Fyrst og fremst verður dagurin ein familjudagur, har høvi verður at síggja vinir og kenningar, práta, spæla og hava eina góða løtu saman, men eisini verða onnur tiltøk á skránni. Fyrireikararnir vóna, at dagurin verður eins góður og undanfarnu árini og at nógv, bæði kend og nýggj andlit vera at síggja í Leirvík. Tað er hugaligt at merkja, at talið av luttakarum til familjudagin og av limum í felagnum er í støðugum vøkstri. Í fjør vóru yvir 100 fólk tilmeldað familjudagin og spennandi verður at vita, um ikki talið av luttakarum fer at gerast enn størri í ár.

Kostnaður fyri allan dagin: 125 kr fyri vaksin (yvir 15 ár) børn 3-14 ár 50 kr og 0-2 ár ókeypis.

Ættleiðingarfelagið er fyri ØLL, ið hava áhuga fyri ættleiðing og dagurin er tí ikki bert roknaður teimum, sum í løtuni hava ættleidd børn. Vónandi eru onkrar familjur, ið enn ikki hava ættleitt børn, eisini áhugaðar í at luttaka. Somuleiðis hevði tað verið stuttligt um ommur og abbar, enn fleiri hálvvaksin og vaksin ættleidd ella ættleiðingarforeldur, ið børnini eru vorðin vaksin hjá, løgdu leiðina framvið. Kanska onkur er, ið ikki hevur hug at vera við allan dagin. Tí verður í ár eisini møguleiki fyri einans at vera við til morgunmatin. Tá er kostnaðurin 50 kr.

Tekning í seinasta lagi 21. apríl hjá felagnum á teldupostadressuni post@aettleiding.fo ella við at ringja á telefon nr. 443304, 443135, 508972 ella 260943. Ikki er neyðugt at vera limur í felagnum fyri at luttaka, men nýggir limir eru hjartaliga vælkomnir at tekna seg í samband við tilmeldingina.


**Hvønn dag í mars mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnina innan fríggjadagin 6. apríl 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.**

**Vinningur í mars er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-**

**Drigið verður fyrstu vikuna í apríl.**

**Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.**



SUDOKU

MARS-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | |
| | 4 | | | 9 | | | 8 | |
| | | 5 | 4 | | 3 | 6 | | |
| | 2 | 4 | | 5 | | 7 | 6 | |
| 1 | | | | | | | | 5 |
| | 8 | 7 | | 3 | | 2 | 9 | |
| | | 8 | 5 | | 6 | 3 | | |
| | 1 | | | 7 | | | 2 | |
| | | | | | | | | |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:**

**Bústaður:**

**Telefon:**

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í mars**

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

Sosialurin